VIÐMERKINGAR

Sjálvstýri Føroya fólks

Jógvan Sundstein

Tað eru nú liðin 3 1/2 ár síðani núverandi landsstýri sá dagsins ljós. Hetta landsstýri setti sær fyri at vinna Føroyum og Føroya fólki fullveldi. Ein greið ætlan varð sett upp, og eitt sera drúgt og gott fyrireikingararbeiði varð gjørt frá føroyskari síðu. Samráðingarnar Føroya og Danmarkar millum høvdu tí allar møguleikar fyri at ganga væl og skjótt. Tað var ein spurningur um vilja frá báðum síðum at fáa skipanina at virka.

Men her upplivdu vit tað ótrúliga at danska stjórnin — umboðandi eitt fólk sum sigur seg vera fólkaræðisligt og vilja verja sjálvsavgerðarrættin hjá øðrum tjóðum — setti seg ímóti ynskinum og viljanum hjá føroysku tjóðini at fáa fullveldi og rættin at ráða í egnum landi. Danska stjórnin fekk eisini Fólkatingið til at taka undir við sær í hesi ódemokratisku kúgingini av føroyingum. Hetta varð gjørt út frá tí fundamentalu misfatan, at danir meintu, at Føroyar vóru ein integreraður partur av Danmark og danska ríkinum, og at føroyingar ikki eru ein egin tjóð, men bert danir. Hendan danska uppfatanin er so skeiv, sum hon kann vera.

Føroyingar eru ein egin tjóð. Føroyar eru ongatíð innlimaðar í danska ríkið, men tær hava í nærum tvey hundrað ár verið at rokna sum danskt hjáland. Veruleikin er, at Føroyar eru í kongsfelagskapi við Danmark, og hendan støðan hevur gjørt, at danska stjórnarvaldið hevur praktiserað stýringina av Føroyum sum eitt hjáland. Danska grundlógin er sum stjórnarskipan ongatíð sett í gildi í Føroyum. Hon nevnir heldur ikki Føroyar, burtursæð frá, at hon gevur føroyingum møguleika at velja tveir fólkatingslimir.

Eitt eyðkenni fyri stýringina av einum hjálandi er, at peningur eygsjónliga fer frá stýrandi landinum til hjálandið, meðan hann meiri dult fer hin vegin serliga gjøgnum vinnufyritøkur. Soleiðis hevur tað eisini fyri stóran part verið millum Danmarkar og Føroya. Tað skuldi tí veri heilt náturligt, at gjøgnumført eina niðurlaging av donsku peningaveitingunum til fullveldið Føroyar yvir eini 10 ár. Líknandi skipanir hava onnur lond gjøgnumført fyri teirra hjálond í óteljandi førum.

Fullveldisætlan landsstýrisins var góð frá byrjan av. Hevði viljin frá danskari síðu verið til staðar, var ætlanin gjøgnumført tíðliga í nú skjótt farna valskeiði. Men viljin var ikki til staðar, og tí noyddist landsstýrið at leggja á annan bógv.

Nýggja leiðin

Hetta varð so gjørt við samtyktini av uppskotinum um "Sjálvstýri Føroya Fólks". Við støði í hesum uppskoti er síðani samtykt løgtingslóg um yvirtøku av málsøkjunum á lista A í heimastýrislógini. Eisini eru ítøkiligar ætlanir um aðrar yvirtøkur. Harafturat, og tað er sera týdningarmikið, er á uppskoti til fíggjarlógina fyri 2002 danski blokkstuðulin lækkaður við um leið 350 mió. kr. Ætlanin er so ár um ár at minka blokkstuðulin, og harafturat at stovna ein búskapargrunn til stabilisering av føroyska búskapinum. Hetta er ein skilagóð og gongd leið. Á hendan hátt verður, sum við hvørt tikið til, "heimastýrislógin tømd". Tá nøkur ár eru farin er danski statsstuðulin stórt sæð burtur, og ein sjálverandi búskapur fingin til vega.

Tá hetta er hent, er øll argumentatión fyri núverandi sambandsstøðu burtur. Tí næstan uttan undantak er grundgevingin hjá teimum, sum ikki vilja sjálvstýri, tann, at vit klára okkum ikki uttan danskan stuðul. Tá vit hava víst, at vit klára okkum uttan hendan pening, skuldi gøtan ligið heilt greið at sett fullveldi á stovn. Til ta tíð er eisini rætt at taka eina fólkaatkvøði, har Føroya fólk góðkennir ta nýggju stýrisskipanina.

Tað hevur verið nógvur orðadráttur um fólkaatkvøður. Løgmaður hevur fingið ákoyringarnar fyri ikki at halda fólkaatkvøðuna, sum ætlað var hin 28. mai 2001. Men her gjørdi løgmaður púra beint. Fólkaatkvøður skulu ikki haldast í tíð og ótíð. Um upprunaliga fullveldisætlan landsstýrisins hevði verið góðkend av donsku stjórnini, so er klárt, at fólkaatkvøða skuldi veri til staðfestingar av henni. Men tá eingin staðfesting av eini endaligari nýggjari stýrisskipan fyri fullveldið Føroyar var at gera, skuldi sjálvandi heldur eingin fólkaatkvøða vera.

Tí skal heldur eingin fólkaatkvøða vera um yvirtøkur, minking av blokkstuðlinum ella líknandi málum. Fólkaatkvøðan skal vera um eina endaliga umskipan av stýrislagi Føroya frá einum hjálandi til eitt frítt fólkaræðisligt fullveldi. Allar aðrar fólkaatkvøður í sjálvstýrisprosessini eru misbrúk av hesum hátíðarliga góðkenningarhátti og eru í frægasta lagi tekin um veikar politikarar, sum ikki sjálvir tora at taka støða, og í ringasta lagi tekin um politikarar, sum halda seg kunna nýta demagogiskan framfarðarhátt til at øsa fólkahugsanina. Tað umboðandi demokratiið, sum vit hava, byggir á, at persónar verða valdir á ting at taka politiskar avgerðir, so leingi teirra valskeið er galdandi.

Í hesum sambandi kann eisini nevnast tann øsing, sum við hvørt ger seg galdandi í sambandi við veljararkanningar. Hvørja ferð ein veljarakanning verður kunngjørd, skulu politikarar úttala seg um "úrslitið". Teir sum hava fingið góð tøl, halda seg longu hava vunnið eitt val. Ja vit hoyra enntá núverandi andstøðupolitikarar tala um, at samgongan ikki longur hevur meiriluta, um kanningartølini av tilvild skuldi víst hetta. Ein skuldi ikki trú, at hesir persónar kendu tað politisku skipanina hjá okkum. Hon byggir ikki á veljarakanningar. Hesar hava einki at siga. Vit hava loyniligt val 4. hvørt ár ella oftari, tá tingið verður valt. Og hetta situr og tekur avgerðir til næsta val.

Hvør vil hava sjálvstýri?

Teir tríggir núverandi landsstýrisflokkarnir vilja føroyskt sjálvstýri. Og tað er at skilja sum føroyskt fullveldisríki. Teir royndu at fáa tað eftir tí leisti, sum niðurfelt varð í upprunaliga samgonguskjalið. Hetta gekk ikki. Teir hava tí gjørt tær samtyktir, sum nevndar eru frammanfyri. Við hesum flokkum í meiriluta kunnu vit tí rokna við, at vit um nøkur ár fáa skipað eitt føroyskt fullveldisríki.

Miðflokkurin hevur fleiri ferðir úttalað, at hann gongur inn fyri føroyskum fullveldi, og vit mugu rokna við, at hann stendur við sítt orð. Roknast kann tí eisini við, at hann stuðlar einum fullveldislandsstýri.

Hinvegin hava bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin við hond og fót roynt at forða landsstýrinum í teirra arbeiði fyri fullveldinum. At Sambandsflokkurin hevur gjørt hetta, og framvegis fer at gera tað, vitstu øll helst frammanundan. Málburður flokksins í teirra minnilutaáliti í tingmáli nr. 114/2000 ber eisini boð um, at har er einki at vænta. Javnaðarflokkurin kundi harafturímóti havt eina ávirkan á gongdina, bæði í politiska arbeiðinum í Føroyum og eisini hjá donsku stjórnini, um teir høvdu tikið eina positiva støðu til málið. Hetta hava teir kortini ikki gjørt, heldur hava spottandi og niðurgerandi orðafloymar ljóða frá teirra síðu. Vit kunnu tí ikki rokna við at fáa nakran bata í stjórnaligu viðurskiftum Føroya, um hesir báðir flokkar tilsamans fáa meiriluta á Føroya Løgtingi.

Javnaðarflokkurin hevur við hvørt fórt fram, at nú ræður um at fáa ein meiriluta til at samtykkja eina nýggja stjórnarskipan við sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin (sum í veruleikanum ikki er til) og at hetta skal vera ein endalig skipan, so friður verður um stjórnarmálið í Føroyum. Men flokkurin átti at vita, at eitt fólk, sum ikki hevur vunnið síni endaligu sjálvsavgerðarrættindi, ongatíð fer at gevast við at stríðast fyri sínum frælsi. Friður verður tí ikki um hesi viðurskifti, fyrrenn tað fulla sjálvstýri er vunnið.

Tað er eisini greitt, at líkamikið hvør annars hevur meiriluta á Føroya Løgtingi, so verður heilt náturligt ikki øll megi løgd í at bøta um og loysa øll onnur samfelagsmál. Ikki fyrrenn føroyingar einsamallir ráða fyri øllum sínum viðurskiftum, bæði innlendis og mótvegis útheiminum, letur hetta seg gera.

Hvussu eru so politisku útlitini?

Tað er einki at taka seg aftur í, at tann politiska samgonga, sum hevur skipað landsstýri hetta valskeiði, hevur gjørt eitt megnararbeiði. Á nógvum økjum eru stórir batar, politiskt og búskaparliga hava teir dugað at stýrt, og einki er at ivast í, at teir kunnu halda fram við hesum, hóast flokkarnir á fleiri økjum eru sera ymiskir. Í einu sjálvstøðugum Føroyum koma Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin neyvan at hava eitt nært samarbeiði, men so leingi sjálvstýrið ikki er fingið er neyðugt, at teir gera hetta arbeiði liðugt. Tí tað er fortreytin fyri øllum øðrum varandi loysnum og batum.

Andstøðuflokkarnir hóreiggja sær longu nú sum um teir longu høvdu vunnið komandi val. Ferð eftir ferð tala teir um, at tíðin hjá hesum landsstýrinum skjótt er runnin. Hvat vita teir um tað? Tað velst um valúrslitið. Eftir fyrr galdandi stýrisskipan skuldi løgmaður og landsstýri veljast av nýggjum aftaná hvørt løgtingsval. Nú fer tilnevning av løgmanni ikki longur fram av sær sjálvum eftir løgtingsval. Løgmaður metir nú sjálvur um hann hevur møguleika at halda fram, og í tí sambandi roynir hann sjálvandi at kanna, um hann hevur meiriluta ímóti sær ella ikki. Nýggjur løgmaður skal ikki tilnevnast uttan so, at sitandi løgmaður sjálvur heitir á løgtingsformannin um at loysa seg úr starvi.

Vónandi halda núverandi landsstýrisflokkarnir so væl skil á sær sjálvum, sjálvt um valstrið verður komandi vár, at teir koma so mikið væl burtur úr valinum, at løgmaður og hansara landsstýrið halda fram eisini í komandi valskeiði. Tá fáa teir møguleika at byggja á tað arbeiði, teir hava gjørt og nýta tað sum grundarlag fyri at lyfta Føroya land eitt stórt stig fram á frælsis- og framburðsleið.

Politisk rás

Rás 2 fer hetta fram móti jólum at skipa fyri beinleiðiss politiskum sendingum, har teir seks flokkarnir, sum hava umboð á tingi, fara at luttaka

POLITIKKUR

Tey, sum hava áhuga fyri politikki, kunnu frá 6. november og seks týsdagar fram hoyra á Rás 2, hvat politisku flokkarnir fara at bjóða upp undir komandi valini.

Sonni Smith, tíðindaleiðari á Rás 2, sigur, at sendingarnar verða skipaðar eitt sindur øðrvísi, enn aðrar politiskar sendingar, sum útvarpaðar plaga at verða. Tær verða sendar beinleiðis týsdag klokkan 15.30 og vara ein tíma. Seinni í somu viku verða tær so endursendar, sigur tíðindaleiðarin á Rás 2.

Sendingarnar verða skipaðar soleiðis, at tann flokkurin, sum eigur sendingina, fer tann fyrra hálva tíman av sendingini at leggja fram tað, hann fegin vil hava, at fólk skulu hoyra. Flokkurin velur tað fólk, sum hildið verður duga best at umboða flokkin við tí, sum førast skal fram. Og tað er ikki neyðugt, at tað er ein aktivur politikari, sigur Sonne Smith.

Seinna hálva tíman av sendingini, fara umboð fyri hinar fimm flokkarnar, sum eisini vera í útvarpsstovuni, at taka til sín og koma við viðmerkingum til tað, sagt hevur verið, eins og slíkt, tann ávísi flokkurin hevur gjørt í sínum politiska arbeiði.

Raðfylgjan verður tann, at Javnaðarflokkurin fer at leggja fyri tann 6. november. Tann 13. november eigur Sambandsflokkurin tørn, meðan Sjálvstýrisflokkurin sleppur fram at tann 20. november. Síðan kemur Fólkaflokkurin tann 27. november, Tjóðveldisflokkurin tann 4. desember og at enda verður Miðflokkurin í útvarpsstovuni tann 11. desember frá klokkan hálvgum fýra til hálvgum fimm seinnapartin, sigur Sonne Smith, tíðindaleiðari á Rás 2.

ej

Trý ár longri á arbeiðsmarknaðinum

Landsstýrið heldur tíðina vera komna til at seta fráfaringaraldurin upp aftur, so fólk kunnu arbeiða, til tey fylla 70 ár.

FRÁFARINGARALDUR

Magnus Dam

Landsstýrið fer nú at virka fyri, at starvsfólk hjá tí almenna kunnu steðga trý ár longri á arbeiðsmarknaðinum. Síðani 1993 hevur fráfaringaraldurin verið 67 ár, men fakfeløgini skulu nú siga landsstýrinum, hvat tey halda um, at fráfaringaraldurin verður settur til 70 ár aftur, eins og hann var áðrenn 1993.

67-ára fráfaringaraldurin kom í gildi við árslok 1992 sum eitt av mongum krepputiltøkum. Hetta varð ásett í einum rundskrivi, sum allir almennir stovnar hava verið noyddir at fylgja líka síðani.

Nú arbeiðsloysið er lítið og einki, og tey eldru gerast fleiri og fleiri, hevur landsstýrið valt at endurskoða hesa nýggju ára gomlu siðvenjuna. Í næstum verða stovnar, fakfeløg og tænastumannafeløg biðin um at koma við viðmerkingum til, at fráfaringaraldurin aftur verður 70 ár. Hesum boðaði Karsten Hansen, landsstýrismaður, frá, tá hann svaraði einum fyrispurningi, sum Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum hevði sett um 67-ára fráfaringaraldurin.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við einum eldrapolitikki fyri arbeiðsmarknaðin, og tað er í hesum sambandi, at fráfaringaraldurin helst verður settur upp aftur. Eisini skulu eldri starvsfólk hava møguleika til at fara niður í tíð, um tey ynskja tað, eins og sáttmálarnir við almennu fakfeløgini frá í ár taka hædd fyri.

Breið semja tykist vera í løgtinginum um at seta fráfaringaraldurin upp, so fólk hava møguleika fyri at arbeiða hjá tí almenna, til tey fylla 70 ár.

Einki gjørt við stirvnu umsitingina

Anfinn Kallsberg hevur einki gjørt fyri at effektivisera umsitingina, hóast hann fyri einum ári síðani lovaði at taka málið upp, heldur Annita á Fríðriksmørk úr Tjóðveldisflokkinum

Anita á Fríðriksmørk sóknast nú eftir, at løgmaður tekur stig til at trimma almennu umsitingina, sum hann lovaði í fjør.

ALMENN FYRISITING

Magnus Dam

Almenna umsitingin er ov stirvin. Hon er vaksin við risa ferð, síðani bygnaðarbroytingarnar hjá Finn Normann Christensen, men einki er gjørt við at laga hana til føroysk viðurskifti, so størri gagn fæst burturúr mongu embætisfólkunum.

Tað er støðan hjá Annitu á Fríðriksmørk úr Tjóðveldisflokkinum, sum hartar løgmann fyri ikki at hava tikið hendan spurningin upp í nóg góðari tíð.

Nú hálvt ár er eftir av valskeiðnum roynir Annita á Fríðriksmørk enn einaferð at sannføra løgmann um, at umsitingin hevur stóran tørv á ábotum.

Tingkvinnan vísir á, at miðfyrisitingin hevur verið fyri einum øgiligum vøkstri seinastu árini, men eisini er gjørt fyri at miðsavna serfrøðina, sum liggur í teimum einstøku aðalstýrinum.

Spjaða vitanina

- Servitanin verður spjødd runt á aðalstýrini og aðrar almennar stovnar. Soleiðis hava vit eitt sindur av vitan alla møguliga staðni, í staðin fyri at hava eina stóra og sterka servitan á einum stað, sigur Annita á Fríðriksmørk í einum fyrispurningi til Anfinn Kallsberg, løgmann.

Hon heldur, at meiri fekst burturúr starvsfólkunum, um eitt nú búskaparfrøðingarnir, løgfrøðingarnir og EDV-fólkini sótu saman í hvør sínum fakbólkum og arbeiddu í einum umhvørvi, sum er teirra fakøki, heldur enn at sita hvør í sínum lagi úti í ymsu aðalstýrunum. Tað eru Føroyar og lítlar til, heldur Annita á Fríðriksmørk.

Hon vil hava løgmann at siga sær, um hann hevur ætlanir um at gera broytingar innan miðfyrisitingina, eins og hann segði fyri einum góðum ári síðani. Tá segði løgmanður, at hann fór at virka fyri, at arbeiðið, sum løgfrøðingar og búskaparfrøðingar gera, verður samskipað. Endamálið er, segði løgmaður tá, at fáa nøkur faklig fora, sum arbeiða saman um uppgávurnar. At varðvetia fakligu breiddina í einstøku stýrunum og tryggja løgmanni og landsstýrismonum ta bestu tænastuna.

- Síðani svarið kom er einki hent á hesum øki, heldur Annita á Fríðriksmørk, sum tí vil hava løgmann at svara uppá, um nakrar broytingar eru á veg, nú bara hálvt ár er eftir av valskeiðnum.

Rura á donskum



Forlagið Borgen gevur út bókina Klodsmajorer og englebørn eftir Tóru Tóroddsdóttir

ÚTGÁVA

Turið Kjølbro

Klodsmajorer og englebørn er danska heitið á bókini Rura -rørslumenning og sansaskipan hjá føroyskum børnum eftir Tóru Tóroddsdóttir, sum er íslendsk, men hevur búð í Føroyum í nógv ár.

Høvundurin, ið er útbúgvin fysioterapeutur, hevur út frá drúgvum royndum í føroyska skúlaverkinum skrivað eina yrkisbók, tann fyrsta av sínum slagi á føroyskum, um sansamenning, rørslubúning og sansaskipan. Bókin kom út í 1999. Nú hevur Solveig Debess týtt bókina úr føroyskum til danskt, og forlagið Borgen gevur út.

Umleið 5-10 prosent av øllum børnum hava trupulleikar við sansaskipanini. Hesi eru klomrut og óstortlig, og hava trupulleikar í rørslumenningini hóast tey eru vanliga gávað børn.

Bókin hjá Tóru Tóroddsdóttir lýsir sansamenningina og leggur dent á týdningin á rørslu- og sansastimulasjón, eina stimulasjón, sum byrjar longu í fosturstøðuni.

Bókin leggur serligan dent á klomrut, ókonsentreað børn og gerandisdag og trupulleikar teirra. Ítøkiligt og gjøgnumroynd uppskot eru til, hvussu foreldur, dagstovnar og skúlar kunnu stuðla barnið og gera tað virkið. Ein viðgerð sum ger børnini betur fyri sálarliga og sosialt.

Bókin er ætlað foreldrum og fakfólki, pedagogum, lærarum, heilsusystrum, terapeutum og øðrum, sum arbeiða við børnum.

Í bókini eru tekningar og myndir, og Elisabeth Berents, sum er fysioterapeutur, skrivar innleiðing. Har skrivar hon eitt nú, at bókin fyllir eitt hol í donskum bókmentum um børn við sansatrupulleikum. Bókin gevur lesaranum eina sannførandi fatan av, at tað loysir seg at gera nakað, tí orkan og møguleikarnar hjá einstaka barninum geva vón fyri framtíðina.

Søgur og ævintýr Símunar av Skarði

Fjórða bókin í ritverki Símunar av Skarði er komin út

ÚTGÁVA

Flest øll munnu vita, at Símun av Skarði yrkti tjóðsong okkara "Tú alfagra land mítt" og aðrar sangir og sálmar, men tey fæstu munnu gruna, at hesin merkismaður, kendur sum annar teirra, ið settu á stovn Føroya Fólkaháskúla, samanlagt hevur lagt so nógv skrivligt úr hondum, at heildarritverk hansara fer at telja 9 ella 10 bøkur.

Fyrsta bókin í ritverkinum, yrkingarnar, kom út í 1998. Í 1999 kom onnur bókin um søguligar greinir og greinir um skaldskap og søgu. Triðja bókin kom í fjør. Evnini í henni eru: skald og skaldskapur, mál og upplýsing, mentan og politikkur, lestrar, kvøður og ummæli.

Í hesum døgum kemur út fjórða bókin í ritverkinum. Hetta eru søgur hansara, fjúrtan í tali, 11 teirra upprunasøgur og ævintýrini, 22 í tali, sum hann týddi úr norðurlandamálum.

Søgurnar vórðu skrivaðar í árunum 1904-19, tó er brotið "Nú er tíð at stoyta kerti til jóla", tað seinsta, sum Símun skrivaði, frá 1941, árinum fyri, hann doyði. Ævintýrini eru prentað fyrstu ferð í tíðarskeiðinum 1907-15, flestu teirra eru norsk, nøkur eru íslendsk, men har eru eisini ævintýr úr Írlandi, Týsklandi, Frankaríki, Italia, Russlandi, og so eru tvey ævintýr úr Túsund náttum og eini.

Turið Sigurðardóttir, bókmentafrøðingur, stjórnar ritverkinum. Forlagið Fannir gevur út. Olivur við Neyst hevur gjørt inngangsmynd til ávikavist søgurnar og ævintýrini, og Ingi Joensen hevur evnað kápuna.

Henda fjórða bókin í røðini er 274 síður og kostar 300 krónur eintakið. Samanlagt telur ritverkið nú um 1150 síður.

Tær fyrstu bøkurnar í røðini fáast enn í bókabúðunum.